# Tryggingar & eftirløn

## Havnar Handverkarafelag o. fl lærlingar



# Havnar Handverkarafelag o. fl lærlingar

### VÆLKOMIN

Havnar Handverkarafelag saman við niðanfyri nevndu fakfeløgum bjóða limum sínum trygging í samstarvi við Tryggingarfelagið LÍV.

- Havnar Handverkarafelag
- Vágs Handverkarafelag
- Tvøroyrar Handverkarafelag
- Skála Handverkarafelag
- Grafiska Yrkisfelagið

Avtalan er galdandi fyri virknar limir og skrivstovufólk hjá fakfeløgunum

**Fyrivarni** fært tú heilsutreytaða veiting, eitt nú frá øðrum tryggingarfelag, ella almannaveiting við atliti at stuðla undir ella varðveita tilknýtið til arbeiðsmarknaðin, t.d. Tillagað starv ella Arbeiðsbúgving, hevur tú skyldu at boða okkum frá. Um tú ikki hevur boðað okkum frá, er sannlíkt at tryggingarnar ikki taka við.

Verður farið úr skipanini innan eftirlønaraldur, kann framhald av tryggingini avtalast við LÍV.

### SAMLAGSTRYGGING

Tryggingin er skipað sum samlagstrygging og gevur rætt til útgjald:

- við deyða
- um hjúnafelagi/sambúgvi* doyr
- við ávísum hættisligum sjúkum
- til hoyritól
- lokaupphædd

Eitt møguligt útgjald er skattafrítt.

### TILSKILAN

Við deyða innan fylta fólkapensjónsaldur, verður tryggingarupphæddin útgoldin sambært tilskilan.

Útgoldið verður til "næsta avvarðandi", um ikki onnur skrivlig avtala er gjørd við LÍV.

"Næsti avvarðandi" er í fyrstu atløgu eftirsitandi hjúnafelagi. Er eingin hjúnafelagi, verður útgoldið til sambúgva*****. Er eingin sambúgvi, verður útgoldið til børn. Eru eingi børn verður útgoldið sambært testamenti/arvalógini.

*****Við **sambúgva** er at skilja persónur, ið livir saman við liminum í felags bústaði(somu adressu), og at parið væntar, hevur ella hevur átt felags barn ella at parið hevur livað saman í hjúnalagi, uttan íhald seinastu 2 árini undan deyðsdegnum.

**Ynskist tryggingarupphæddin útgoldin til onnur enn "næsta avvarðandi", skal hetta fráboðast LÍV skrivliga.**

Skjalið "Broyting av tilskilan" finnur tú liv.fo/tilskilan

## Ráðgeving

Tú ert altíð vælkomin at seta teg í samband við okkum á LÍV.

**P/F Tryggingarfelagið LÍV**
Kopargøta 1
Postboks 206
110 Tórshavn

Tlf. 31 11 11
liv@liv.fo

**Skrivstovutíðir:**
Mánadag-hósdag: 10.00-16.00
Fríggjadag: 10.00-15.00

**Við deyða**
Tryggingin er galdandi bæði í arbeiði og frítíð. Útgoldið verður uttan mun til, um deyðin skyldast sjúku ella vanlukku.

Doyr limurin verður tryggingarupphæddin útgoldin til tilskilaða, sí treytir á fyrru síðu undir *TILSKILAN.*

**Børn:**
Afturat tryggingarupphæddini við deyða verða kr. 35.000,- útgoldnar til hvørt barnið sær undir 21 ár, herundir adoptiv-og fosturbørn.
**Hjúnafelagi/sambúgvi:**
Doyr hjúnafelagi/sambúgvi, verður kr. 100.000 útgoldið.
Í 2026 er upphæddin kr. 200.000
Í 2027 fylgir upphæddin høvuðsavtaluni.
(Ikki galdandi fyri útgjald til børn.)

**Ávísar hættisligar sjúkur**

Útgoldið verður, um

- **tú** ella
- **børn undir 18 ár**

verða rakt av "ávísari hættisligari sjúku".

Nærri ásetingar og listin yvir fevndar sjúkur er at finna í tryggingartreytunum.
Ávísar hættisligar sjúkur fevnir eisini um terminala sjúkuavgerð.

**Ískoyti til hoyritól**

Fært tú almennan stuðul til hoyritól, hevur tú eisini rætt til útgjald frá LÍV.

LÍV rindar í mun til almenna stuðulin og veruliga kostnaðin.

Endurgoldið verður **upp til kr. 4.000** fyri hvørt hoyritólið.

**Óarbeiðsføri**

Verður arbeiðsorkan skerd við 50% ella meira fellur tryggingargjaldið burtur aftaná 3 mánaða óarbeiðsføri.

Eftir hetta rindar LÍV tryggingargjaldið so leingi óarbeiðsførið stendur við.

Tó í mesta lagi fram til man nær fólkapensjónsaldur.

**Lokaupphædd**

Eftir neyvari ásetingum hjá Havnar Handverkarafelag o.fl. verður upphæddin útgoldin í einum við fólkapensjónsaldur.

**Við deyða**
*Skattafrí upphædd*

| | |
|---|---|
| Til fólkapensjón aldur | kr. 600.000 |
| Til børn u/21 ár | kr. 35.000 |
| Hjúnafelagi/sambúgvi | 100.000 |

**Ávísar hættisligar sjúkur**
*Skattafrí upphædd*

| | |
|---|---|
| Limur | kr. 150.000 |
| Til børn u/18 ár | kr. 150.000 |

**Við óarbeiðsføri**
–

| |
|---|
| LÍV rindar tryggingargjaldið |

**Full lokaupphædd**
*Skattafrí upphædd*

| | |
|---|---|
| 2024 | kr. 100.000 |

# Innlit

**Kundaportalur**

Á kundaportali okkara "Mítt LÍV" fært tú innlit í uppsparing, persónligar tryggingar, samlagstrygging, inngjøld og teknisku uppgerðina.

Kundaportalin finnur tú á www.liv.fo

**Ritast kann inn við** Samleikanum

Hevur tú ikki Samleikan, ert tú vælkomin at seta teg í samband við okkum á LÍV.